# *SÁTTMÁLI*

millum

# Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

og

# Fíggjarmálaráðið

2019/2022

# *Innihaldsyvirlit*


**Partur I . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7**
§ 1. Sáttmálaøki og samráðingarpartar . . . . 7
§ 2. Starvslýsingar. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
§ 3. Setanarbræv . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
§ 4. Lønarútgjaldan . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
§ 5. Løn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 8
§ 6. Flokkingar við FMR . . . . . . . . . . . . . 9
§ 7. Framhaldsútbúgving hækkar grundlønina 9
§ 8. Fyribils setan í hægri starv . . . . . . . . . . 9
§ 9. Starvsaldur. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
§ 10. Eftirløn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
§ 11. Eftirsitiløn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
§ 12. Tænastubúni . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
§ 13. Farloyvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
§ 14. Tænastufrí . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
§ 15. Uppsøgn . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
§ 16. Sjúkrarøktarfrøðingar
settir sum tænastumenn. . . . . . . . . . . 12

**Partur 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13**
§ 17. Arbeiðstíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
§ 18. Parttíðarsett . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
§ 19. Arbeiðsætlan . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
§ 20. Umlagdir tímar . . . . . . . . . . . . . . . . 14
§ 21. Frítíðarskeið. . . . . . . . . . . . . . . . . . 14
§ 22. Hvílutíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
§ 23. Yvirtíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
§ 24. Kvøld- og náttararbeiði . . . . . . . . . . . 15
§ 25. Vikuskiftisarbeiði. . . . . . . . . . . . . . . 16
§ 26. Halgidagar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
§ 27. Tilkalli- og samdøgurvakt . . . . . . . . . 17
§ 28. Telefon. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19
§ 29. Uppkall . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19

§ 30. Sundurbýtt tænasta . . . . . . . . . . . . . . . 20
§ 31. Avspákan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20
§ 32. Tímalønt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 20

**Partur 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22**
§ 33. Ferðing innanoyggja . . . . . . . . . . . . . 22
§ 34. Ferðing við sjúklingi innanoyggja . . . 22
§ 35. Ferðing við sjúklingi uttanlanda. . . . . 23
§ 36. Hita og kulda viðgerð . . . . . . . . . . . 23
§ 37. Arbeiði í infektiónsmedisinskari
verjudrakt . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
§ 38. Trýsttangin. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
§ 39. Psykiatriviðbót . . . . . . . . . . . . . . . . 24
§ 40. DAT viðbót . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
§ 41. Dialysu viðbót . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
§ 42. Framhaldsútbúgving . . . . . . . . . . . . 24
§ 43. Kliniskir vegleiðarar . . . . . . . . . . . . . 25
§ 44. Tímaløn fyri undirvísing,
próvdøming og fyrilestur . . . . . . . . . . 25
§ 45. Heilsuskúli Føroya . . . . . . . . . . . . . . 27
§ 46. Fróðsskaparsetur Føroya . . . . . . . . . . 27

**Partur 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28**
§ 47. Ferðaútreiðslur . . . . . . . . . . . . . . . . 28
§ 48. Flutningur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
§ 49. Bústaður. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
§ 50. Arbeiðshølið . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
§ 51. Frítíð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
§ 52. Sjúka og barn sjúkt . . . . . . . . . . . . . 29
§ 53. Barnsburðarfarloyvi og ættleiðingarfarloyvi 30

**Partur 5 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32**
§ 54. Álitisfólk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

§ 55. Álitisfólkaskeið . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32
§ 56. Uppgávan hjá álitisfólkum . . . . . . . . . 32
§ 57. Broyting í arbeiðsgongd v.m. . . . . . . . 33
§ 58. Nevndarlimir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34
§ 59. Forkvinnan. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34
§ 60. Uppsøgn av álitisfólkum og nevndarlimum 34

**Partur 6 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 35**
§ 61. Fasti Gerðarættur. . . . . . . . . . . . . . . 35
§ 62. Gildi sáttmálans. . . . . . . . . . . . . . . . 35

**Seravtala millum Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar og Kommunala Arbeiðsgevarfelagið 37**
§ 1 Avtaluøki og avtalupartur . . . . . . . . . . . 38
§ 2 Flokkingar FFS og KAF . . . . . . . . . . . 38
§ 3 Leiðarar/stjórar settir í Bú- og Heimatænastu 39
§ 4. Sein vitjan/uppkall. . . . . . . . . . . . . . . . 39
§ 5 Gera lík í stand. . . . . . . . . . . . . . . . . . 39
§ 6 Súkrarøktarfrøðingar í heimatænastuni 40
§ 7 Gildisskeið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 40

**Protokollat við meira . . . . . . . . . . . . . . . . . 41**
Protokollat 1. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
Protokollat 2. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
Protokollat viðvíkjandi arbeiðsumstøðunum 41
Sáttmálaviðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . 41
Treytað protokollat um almenna lønarlagið 42

**Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar. . . . . . . . 43**

**Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 44**

**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins . . . . 48**

**Avtala um serstaka fríviku . . . . . . . . . . . . . 54**

**TEKNOLOGIAVTALA millum Føroya Landsstýri og Sjúkrasystrafelag Føroya . . 53**

**Aðrir sáttmálar. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 56**

# *Partur 1*

### § 1. Sáttmálaøki og samráðingarpartar

Sáttmálin fevnir um sjúkrarøktarfrøðingar, heilsufrøðingar og sjúkrarøktarfrøðislesandi, settir í starv, har samráðingarpartarnir eru Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

1. Sjúkrahúsverk Føroya
2. Almannaverkið
3. Heilsutrygd
4. Gigni
5. Viðgerðar-, hvíldar-, vistar- og umlættingarheimum
6. Sambýlum og bústovnum

Ásetingarnar fyri sjúkrarøktarfrøðingar í hesum sáttmála eru eisini galdandi fyri heilsufrøðingar og sjúkrarøktarfrøðislesandi.

### § 2. Starvslýsingar

Tá ið starv er leyst, skal tað lýsast á viðkomandi stovni, og landsdekkandi miðlum/starvsportalum. Tilskilast skal, hvat starvið umfatar: deild, setanarbrøk, arbeiðstíð, og á hvørjum lønarflokki starvið verður lønt eftir v.m. Sama er galdandi, tá ið lýst verður eftir fyribils hjálp v.m.

Umsóknarfreistin skal vera í minsta lagi 14 dagar frá tí lýst er á landsdekkandi miðli/starvsportali. Er talan um nýtt starv, sum ikki higartil er flokkað, skal Fíggjarmálaráðið/arbeiðsgevari samráðast við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar um flokking, áðrenn starvið verður lýst leyst.

## § 3. Setanarbræv

Í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fær starvsfólkið setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

- Navn og búðstaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta
- Nær setanin tekur við
- Galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir
- Starvsheiti
- Starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri
- Byrjunarløn (grundløn, við navngivnum framhaldsútbúgvingum) umframt serviðbót
- Eftirlønargjald
- Uppsagnartíð hjá arbeiðsgevara og setta
- Setanarbrotpartur, arbeiðstíð og longd á arbeiðsdegi
- Frítíð við løn og frítíðarískoyti
- Setanarøki og arbeiðsstaður/staðir í løtuni

Fatar arbeiðið um fleiri arbeiðsstaðir, skal verða viðmerkt á hvørjum arbeiðsstaði umsøkjarin hevur høvuðsstarv.

## § 4. Lønarútgjaldan

Sáttmálalønt fáa útgoldið lønina afturút

**Stk. 2.** Allir sjúkraróktarfrøðingar skula hava útgreinaðan lønarseðil

**Stk. 3.** Lønin verður útgoldin umleið 25. í mánaðinum

## § 5. Løn

Lønartalvan, sum var galdandi til 30.09.2019, verður broytt samsvarandi hjáløgdum lønartalvum.
Flokking á stig 7 kann bert gerast við semju millum partarnar.

## § 6. Flokkingar við FMR

Sjúkrarøktarfrøðingar ganga stigini: 1, 2, 3, 4, 5 og 6
Varaleiðarar ganga á stig 8
Deildarleiðarar ganga á stig 9
Varastjóri Gigni gongur á stig 10
Leiðandi sjúkrarøktarfrøðingar, Fyristøðufólk við viðgerðar- og hvíldarheim, ganga á stig 11
Stjóri Gigni, Varastjórar á KS og SSH ganga á stig 12
Varastjóri á LS gongur á stig 13

Sjúkrarøktarfrøðingar settir í starv við master, phd ella professara sum førleikakrav, fáa lønar- og setanarviðurskifti samsvarandi sáttmálanum hjá AKF.

Røktari, ið tekur útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur flytur eftir lokna útbúgving yvir á lønarstigan hjá sjúkrarøktarfrøðingunum uttan lønarmiss.

## § 7. Framhaldsútbúgving hækkar grundlønina

Fyri sjúkrarøktarfrøðingar við framhaldsútbúgving verða eftirlønargevandi førleikaviðbøtur latnar soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6 | → | 19 | ECTS við 2% av lønartrin 4 |
| 20 | → | 39 | ECTS við 4% av lønartrin 4 |
| 40 | → | 59 | ECTS við 6% av lønartrin 4 |
| 60 | → | 119 | ECTS við 8% av lønartrin 4 |

## § 8. Fyribils setan í hægri starv

Sjúkrarøktarfrøðingar, sum fyribils røkja hægri starv í minst eina viku, eiga í hesum tíðarskeiði somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vóru settir í hetta hægra starvið.

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingur, sum ikki hevur fráfaringarprógv sum heilsufrøðingur, men hevur góðkenning frá heilsustýrinum, kann setast í starv sum heilsufrøðingur í avmarkaða tíð.

**Stk. 3.** Heilsufrøðingar í skúla binda seg til annað arbeiði í skúlafrítíðum/skúlafrídøgum (uttan fyri egnu frítíð)

enn beinleiðis arbeiði við børnum, millum annað tað fyrisitingarliga arbeiðið, ið er bundið at starvinum.

## § 9. Starvsaldur

Starvsaldur er tvey ár á hvørjum lønarstigi hjá øllum sjúkrarøktarfrøðingum.

**Stk. 2.** Starvsaldur verður roknaður fyri fastlønt, har arbeiðstíðin minst er 15 tímar um vikuna.

**Stk. 3.** Framhaldsútbúgving innan sjúkrarøktina telur starvsaldur.

**Stk. 4.** Kann sjúkrarøktarfrøðingur prógva minst 59 tímar um mánaðin uttan at verða í føstum arbeiði, verður starvsaldur roknaður.

**Stk. 5.** Um sjúkrarøktarfrøðingurin ynskir váttan upp á starvsaldur, skal setanarstaðið veita hesa. Sjúkrarøktarfrøðingurin hevur skyldu at vísa váttan upp á starvsaldur hjá nýggjum arbeiðsgevara.

## § 10. Eftirløn

Sjúkrarøktarfrøðingar eru í eftirlønargrunni hjá Lív.

**Stk. 2.** Stovnurin rindar vegna starvsfólkið 15% av grundlønini, tímalønini og viðbøtur vegna framhaldsútbúgving.

**Stk. 3.** Stovnurin greiðir eftirlønargjaldið til Lív.

## § 11. Eftirsitiløn

Doyr sjúkrarøktarfrøðingur, sum er løntur eftir hesum sáttmála, meðan viðkomandi er í starvi, eigur eftirsitandi hjúnafelagi/sambúgvi ella børn undir 18 ár, sum sjúkrarøktarfrøðingurin hevur skyldu at uppihalda, rætt

til løn í mun til uppsagnartíðina, í minsta lagi 3 og í mesta lagi 6 mánaðir.

Eftirsitiløn er tann løn, sum sjúkrarøktarfrøðingurin hevði deyðsdagin. Lønin í mánaðinum, tá ið sjúkrarøktarfrøðingurin doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

### § 12. Tænastubúni

Sjúkrarøktarfrøðingar fáa ókeypis tænastubúna. Um hettar ikki er gjørligt fær:

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingur ið arbeiðir inni á stovni, eitt árligt gjald á 1764 kr.

**Stk. 3.** Sjúkrarøktarfrøðingur, ið arbeiðir inni og úti, eitt árligt gjald á: Fulla tíð 2784 kr. Parttíðarsettir undir 30 tímar um vikuna 2328 kr.

Fyri tímalønt sjá § 32

### § 13. Farloyvi

Sjúkrarøktarfrøðingur kann fáa farloyvi, tá ið tað ikki nervar arbeiðið á stovninum. Farloyvið kann játtast upp til 5 ár. Setanarstaðið hevur ábyrgd av at hava starvið leyst til viðkomandi, tá ið farloyvið er úti.

### § 14. Tænastufrí

Tá sjúkrarøktarfrøðingur hevur fingið játtað tænastufrí við løn, verður henda tíð roknað sum arbeiðstíð, tó ongantíð við meira enn vanligan arbeiðsdag.

### § 15. Uppsøgn

Verður starvsfólk sagt úr starvi, galda ásetingarnar um uppsøgn í løgtingslóg um starvsmenn.

**Stk. 2.** Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið til

ummælis við minst 14 daga freist. Samstundis fær Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum.

## § 16. Sjúkrarøktarfrøðingar settir sum tænastumenn

Sjúkrarøktarfrøðingar settir sum tænastumenn eru umfataðar av tænastumannalógini.

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingar settir sum tænastumenn eru undir eftirlønarskipan samb. tænastumonnum landsins.

**Stk. 3.** Tænastumenn fáa lønina útgoldna frammanundan.

# *Partur 2*

**§ 17. Arbeiðstíð**

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

**Stk. 2.** Hvussu arbeiðstíðin verður býtt út á dagarnar í vikuni, avger stovnurin alt eftir, hvussu arbeiðsgongdin á viðkomandi stovni er. Vanlig tænasta kann tilrættisleggjast millum 7 og 9 tímar.

**Stk. 3.** Stovnurin og álitisumboð/Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar kunnu gera seravtalur um, at tann vanliga arbeiðstíðin kann víðkast við 1 tíma og/ella niðursetast við 2 tímum.

**Stk. 4.** Arbeiðstíð, út um tað, sum avtalað er sum føst arbeiðstíð, verður at rokna sum yvirtíð.

**Stk. 5.** Er mattíðin fastløgd, verður hon ikki roknað við í arbeiðstíðina. Er ikki møguleiki at fastleggja mattíðina, verður hon roknað sum arbeiðstíð, og skal haldast, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Henda fríløtan kann vera upp til ½ tíma, og skal starvsfólkið vera til taks, um brúk er fyri tí. Verður arbeitt 2 tímar ella meiri út um vanliga arbeiðstíð, hevur starvsfólkið rætt til ½ tíma matarsteðg uttan lønarmiss.

**Stk. 6.** Sjúkrarøktarfrøðingar settir sum stovnsleiðarar ella varaleiðarar eru ikki umfataðir av reglunum um hægstu tænastutíð.

**§ 18. Parttíðarsett**

Parttíðarsett verða lønt sambært arbeiðsbrøki. Arbeiða parttíðarsett meira enn avtalað í setanarbrævinum, skal broyting gerast í lønarbrøkinum fyri ta ávísu tíðina.

## § 19. Arbeiðsætlan

Arbeiðsætlan skal verða kunngjørd soleiðis, at sjúkraróktarfrøðingurin altíð kennir sína arbeiðstíð og frítíð 4 vikur fram, og í hesum tíðarskeiði mugu broytingar ikki fremjast. Fara broytingar fram, skal tað bert verða í serligum førum so sum sjúku og altíð í samráð við sjúkrarøktarfrøðingin.

## § 20. Umlagdir tímar

Gerst neyðugt at broyta kunngjørdu arbeiðstíðina í arbeiðsætlanini, skal hettar fráboðast við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, skal viðbót á 15% av dagtímalønini á lønarstigi 4 gjaldast fyri umlagdu tímarnar. Umlagdir tímar er at skilja sum tíð, ið fellur uttan fyri ásettu arbeiðstíðina sambært arbeiðsætlanini, men ikki er at rokna sum yvirtíð.

## § 21. Frítíðarskeið

**a.** Sjúkrarøktarfrøðingurin hevur rætt til eitt frítíðarskeið á minst 63 tímar út í eitt um vikuna. Hevur sjúkrarøktarfrøðingurin frí í vikuskiftinum, skal frítíðarskeiðið liggja har.

Eitt frítíðarskeið, sum liggur í vikuskiftinum byrjar í seinasta lagi fríggjadag kl. 16:00 og endar mánamorgun kl. 07:00.

**b.** Um frítíðarskeiðið ikki hevur nevndu longd sum í a., skulu ístaðin gevast tvey frítíðarskeið. Hesi frítíðarskeið skulu verða minst 40 tímar út í eitt og kunnu ikki leggjast í vikuskiftinum.

Verður frítíðarskeiðið tikið aftur við styttri fráboðan enn 4 vikur, verður samsýning givin sum yvirtíð/mist frítíð fyri í minsta lagi 6 tímar.

Eitt frítíðarskeið sum nevnt undir a. ella b. kann ongantíð liggja á einum halgidegi. Undantikið er, tá skeivur halgidagur fellur á vikuskifti, har starvsfólkið altíð hevur fríðtíðarskeið í vikuskiftinum.

## § 22. Hvílutíð

Sjúkrarøktarfrøðingurin skal hava samanhangandi hvíld á minst 11 tímar um samdøgrið, tó kann hvílutíðin millum tvær vaktir styttast til 8 tímar við skrivligari avtalu millum starvsfólkið og leiðaran.

## § 23. Yvirtíð

Tá ið sjúkrarøktarfrøðingurin verður settur til at arbeiða yvir, skal hann hava boð um tað dagin fyri í arbeiðstíðini. Verður ikki fráboðað rættstundis, skal sjúkrarøktarfrøðingurin umframt yvirtíðarlønina hava viðbót upp á 15% av dagtímalønini á lønartrin 4, um yvirtíðin er meira enn 1 tími.

Arbeiði undir ½ tíma: Rundað til ½ tíma.
Arbeiði yvir ½ tíma: Rundað til 1 tíma.
Eyka tilkallivakt (uttan uppkall),
verður tald við sum yvirtíð.

Yvirtíðarløn er tímaløn + 50%, og skal útgjaldast

## § 24. Kvøld- og náttararbeiði

Fyri hvørjar 40 tímar sum kvøld- og náttarvakt eigur sjúkrarøktarfrøðingurin at fáa frí 3 tímar. Fyri tímalønt starvsfólk er hetta ikki galdandi, tí í tímalønini fyri kvøld- og náttararbeiðið er viðbótin íroknað.

Fyri arbeiði millum kl. 17:00 til 23:00 verður fyri hvønn byrjaðan tíma útgoldið eitt vaktargjald á 20%.

Fyri arbeiði millum kl. 23:00 til 06:00 verður fyri hvønn byrjaðan tíma útgoldið eitt vaktargjald á 30%.

Kvøld og náttararbeiði er arbeiði, ið er byrjað kl. 14 ella seinni, og sum fer út um kl. 17.

Arbeiðir sjúkrarøktarfrøðingur meira enn 31 kvøld- og náttarvaktir í einum ársfjórðingi (roknað árliga frá 1. januar) verður fyri hettar meirarbeiðið útgoldið eykagjald áljóðandi helvtina av áðurnevndu vaktargjøldum.

Hendan grein er eisini galdandi tá arbeitt verður eftir § 25 § 26 og § 27

## § 25. Vikuskiftisarbeiði

Fyri arbeiði leygardag frá kl. 06:00 - 24:00 og mánadag frá kl. 00:00 til vaktin endar mánamorgun, verður fyri hvønn tíma útgoldið leygardagsgjald svarandi til 23,7% av dagtímalønini.

Fyri arbeiði sunnudag frá kl. 00:00 – 24:00 verður fyri hvønn tíma útgoldið sunnudagsgjald, svarandi til 50% av dagtímalønini.

Leygardagsgjald verður ikki latið fyri dagar, tá ið annað gjald verður veitt, til dømis gjald á halgidegi.

Leygardags- og sunnudagsgjald verður eisini givið í samband við yvirtíðararbeiði.

Leygardags- og sunnudagsgjald verður latið fyri hvønn byrjaðan tíma og skal útgjaldast.

Arbeiðir sjúkrarøktarfrøðingur meira enn 6 sunnudagsvaktir í einum ársfjórðingi (roknað árliga frá 1. januar) verður fyri hettar meirarbeiði útgoldið eykagjald áljóðandi helvtina av áðurnevnda gjaldi.

## § 26. Halgidagar

Sjúkrarøktarfrøðingur skal hava frí á øllum hesum døgum: Nýggjársdag, skírisdag, langafríggjadag, páskaaftan, 2. páskadag, dýrabiðidag, flaggdag, kristihimmalferðardag, hvítusunnuaftan, 2. hvítusunnudag, grundlógardag eftir kl. 12:00, ólavsøkuaftan eftir kl. 12:00, ólavsøkudag, jólaaftan, jóladag, 2. jóladag, nýggjársaftan.

Frítíðin á halgidegi verður tald uppí normin og roknað soleiðis: (40 tímar x brøk) x 0,2 = normtímar

**Stk. 2.** Verður arbeitt á halgidegi, er halgidagslønin tímaløn/normtíð + 150%

**Stk. 3.** Verður frítíð á halgidegi tikin aftur við styttri fráboðan enn 4 vikur, verður løn útgoldin fyri í minsta lagi 6 tímar, og rokna soleiðis: Normtíð/tímaløn + 50% + 150%, sum vil fyri 8 t arbeiði geva 8+4+12 = 24 t.

- Arbeiði undir ½ tíma verður rundað upp til ½ tíma
- Arbeiði yvir ½ tíma verður rundað upp til 1 tíma

## § 27. Tilkalli- og samdøgurvakt

Sjúkrarøktarfrøðingum kann verða álagt hesar tilkalli- og samdøgurvaktir:

- Vakt 1: Vakt frá heimi
- Vakt 2: Vakt frá vaktstovu

Sjúkrarøktarfrøðingurin hevur skyldu at møta beinanvegin, tá ið tilkallað verður.

Í samband við vakt frá heimi metir arbeiðsgevarin, um teinurin millum heim og arbeiðsstað er ov langur. Um ov long tíð verður nýtt til ferðing, skal slagið av tilkallivakt broytast frá vakt 1 til vakt 2.

Krøv til vaktstovu eru hesi: Telefon, sovi-, lesi- , skrivi- og skápspláss eftir tíðarhóskandi støði. Atgongd til WC/bað, tekøk og kuldaskáp. Rúmið skal ikki nýtast til annað endamál um dagin. Rúm og skáp skulu verða læst.

Undir vakt 1, hevur sjúkrarøktarfrøðingurin rætt til flutning/hýruvogn eftir skjalprógvi til og frá arbeiðsstaðinum við uppkall. Verður egið akfar nýtt, verður viðbót latin á kr. 125,-, galdandi fyri alla vaktina.

***Tilkallivakt:***

Ein planløgd tilkallivakt er treytað av, at arbeitt hevur verið 8 tímar í dagvakt.

Ein tilkallivakt er partur av tí vanligu viku arbeiðstíðini sambært § 18 stk. 1. við hesum virðum fyri hvønn tíma:

- Vakt 1: 1 tími = 20 min.
- Vakt 2: 1 tími = 45 min.

Tíðin, roknað frá boðsending til virkið arbeiði er liðugt, verður samsýnt við løn sum fyri yvirtíðararbeiði sambært § 23. men minkað við teimum virðum sum standa í vakt 1 og vakt 2. Harumframt galda veitingarnar í § 24. § 25. og § 26. Boðsending verður lønt fyri hvønn byrjaðan tíma í virknum arbeiði. Hvør boðsending telur

minst 1 tíma arbeiði. Fyri fleiri boðsendingar í sama tíma, verður bert samsýnt fyri 1 tíma. Hvílitíðin í § 22 er galdandi.

Um tilkallivakt ikki verður roknað við í ta vanligu viku arbeiðstíðina, verður hon roknað sum yvirtíðararbeiði. Verður álagt eyka tilkallivakt, skal hon umroknast til vanligar tímar og útgjaldast sum yvirtíðarløn.

***Samdøgurvakt:***
Samdøgurvakt verður løgd til rættis á døgum, har virkið arbeiði ikki er lagt til rættis. Ein samdøgurvakt verður at rokna í tí álmanakkasamdøgri, tá teir flestu tímarnir liggja.

Ein samdøgurvakt er partur av tí vanligu vikuarbeiðstíðini, sambært § 17 stk. 1., við hesum virðum um samdøgrið:

- Vakt 1: 14 tímar
- Vakt 2: 20 tímar

Fyri fyrstu 8 tímarnar í virknum arbeiði verður ikki veitt eyka løn. Fyri virkið arbeiði meira enn 8 tímar verður yvirtíðarløn goldin sambært § 23. Tó skal eingin minking gerast við teimum virðum sum standa í vakt 1 og vakt 2. Harumframt galda veitingarnar í § 24. § 25. og § 26. Boðsending verður lønt fyri hvønn byrjaðan tíma í virknum arbeiði. Hvør boðsending telur minst 1 tíma arbeiði. Fyri fleiri boðsendingar í sama tíma verður bert samsýnt fyri 1 tíma. Hvílitíðin í § 22 er galdandi.

Fyri samdøgurvakt í vikuskiftum og halgidøgum verður undir øllum umstøðum, givin veiting fyri minst 8 tímar sambært § 25. og § 26.

Um samdøgurvakt ikki verður roknað við í ta vanligu viku arbeiðstíðina, verður hon roknað sum yvirtíðararbeiði. Verður álagt eyka samdøgurvakt, skal hon umroknast til vanligar tímar og útgjaldast sum yvirtíðarløn.

***Umlagdir tímar í tilkallivakt og samdøgurvakt:***
Gerst neyðugt at broyta kunngjørdu arbeiðstíðina í arbeiðsætlanini, skal hettar fráboðast við minst 72 tíma freist. Verður henda freist ikki hildin, eru ásetingarnar í § 20 galdandi.

Tá ið arbeiðsætlan sambært § 19 stk. 1. verður gjørd, eigur at verða miðað ímóti, at sjúkrarøktarfrøðingurin ikki beint eftir tilkalli/samdøgurvakt verður settur til vanligt arbeiði ella samdøgursvakt.

Verður kortini álagt sjúkrarøktarfrøðinginum at hava vanligt arbeiði ella samdøgurvakt beint eftir tilkallivakt, og hann ikki hevur havt hvíld undir tilkallivaktini sum svarar til minst helvtina av tilkallivaktini (fyri samdøgurvakt 11 tímar), har av minst 4 tímar skulu vera millum kl. 23.00 og byrjanini av komandi tænastu, skal hann ikki byrja dagsarbeiðið, samdøgurvakt ella fríganga, fyrr enn hann hevur fingið 8 tímar samanhangandi hvíld, roknað frá seinastu boðsending.

## § 28. Telefon

Tá sjúkrarøktarfrøðingur brúkar telefon til arbeiðsbrúk, skal arbeiðstelefon verða tøk til sjúkrarøktarfrøðingin.

**Stk. 2.** Tá sjúkrarøktarfrøðingur hevur vakt, ið krevur fastnet telefon, verður latið endurgjald svarandi til linjugjald + fast gjald við fríðari talu í Føroyum.

## § 29. Uppkall

Sjúkrarøktarfrøðingur, ið ikki hevur tilkallivakt/samdøgurvakt, sum verður biðin um at koma til arbeiðis uttanfyri vanliga arbeiðstíð, skal hava løn fyri yvirtíð sambært § 23, og fyri í minsta lagi 3 tímar. Fyri arbeiði meira enn 3 tímar skal gjaldast løn fyri yvirtíð fyri hvønn byrjaðan tíma. Verður sjúkrarøktarfrøðingurin biðin um at koma til arbeiðis fleiri ferðir innan 3 tímar, fær hann tó bert yvirtíðarløn fyri 3 tímar.

Verður sjúkrarøktarfrøðingurin biðin um at koma til arbeiðis í einum frítíðarskeiði sambært § 21, verður løn útgoldin sum yvirtíð/mist frítíð, og fyri í minsta lagi 6 tímar. Verður sjúkrarøktarfrøðingurin biðin um at koma til arbeiðis fleiri ferðir innan 6 tímar, fær hann tó bert yvirtíðarløn fyri 6 tímar.

### § 30. Sundurbýtt tænasta

Arbeiðið eigur at verða lagt soleiðis tilrættis, at sundurbýtt arbeiðstíð – tvs. arbeiðstíð, býtt sundur við einum støðgi á 2 tímar ella meir – ikki kemur fyri. Um sundurbýtt arbeiðstíð kemur fyri, má tað bert verða einaferð um dagin eftir avtalu, og tá verður 15% av dag tímalønini goldið pr. tíma í støðginum.

### § 31. Avspákan

Vunnin frítíð samb. § 24 og § 26 skal avspákast í heilum arbeiðsfríðum døgum áðrenn 3 mánaðir eru farnir, og skal kunngerðast seinast 72 tímar áðrenn avspákað verður. Letur hettar seg ikki gera, verður vunnin frítíð útgoldin sum yvirtíð.

Verður fráboðað avspákan tikin aftur, skal hetta kunngerast í seinasta lagi 72 tímar áðrenn seinasta arbeiðsdag fyri avspákanina. Er ikki fráboðað rættstundis, skal tíðin samsýnast sum yvirtíð.

### § 32. Tímalønt

Tímalønt arbeiði eigur helst ikki at vera.

Sjúkrarøktarfrøðingur, ið ikki er settur í fast starv, fær tímaløn. Tímalønin verður roknað í dagtímum sum 1/2080, í kvøldtímum 1/1924 og í náttartímum 1/1924, svarandi til starvsaldur av grundlønini hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Sjá lønartalvu fyri tímalønt!

**Stk. 2.** Um ein tímaløntur sjúkrarøktarfrøðingur verður settur sum avloysari fyri sjúkrarøktarfrøðing í hægri starvi enn tímalønti, verður lønin roknað í mun til árslønina á tí lønarstigi, ið galdandi er fyri hægra starvið, og annars sum nevnt omanfyri.

**Stk. 3.** Tímalønt hava rætt til fast starv, um tilrættalagt arbeiði er í einum álmanakkamánaði.

**Stk. 4.** Tímalønt fáa ókeypis tænastubúna. Har hetta ikki er gjørligt, verður latin ein viðbót á 1 kr. um tíman.

**Stk. 5.** Starvsaldur verður roknaður fyri tímalønt arbeiði, um sjúkrarøktarfrøðingur kann prógva minst 59 tíma arbeiði í einum mánaði, uttan at hava verið í føstum starvi.

**Stk. 6.** Verður umbiðin tímalønt vakt avlýst seinri enn 4 tímar, áðrenn arbeiðið átti at byrjað, verður løn goldin fyri alla vaktina.
**§** 10 er galdandi

# *Partur 3*

**§ 33. Ferðing innanoyggja**

Bæði út- og heimferð eru at rokna sum arbeiðstíð.

**Stk. 2.** Støðgur upp til 3 tímar áðrenn heimferð er roknaður við í arbeiðstíðina.

**Stk. 3.** Samsýning og endurgjald skal gjaldast sjúkrarøktarfrøðinginum eftir galdandi reglum, sambært semju millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelag Landsins um dagpening.

**§ 34. Ferðing við sjúklingi innanoyggja**

Dagpeningur verður roknaður fyri hvørt samdøgur, sum viðkomandi er burturstaddur. Fyri minni enn samdøgur men meiri enn 4 tímar, verður tímapeningur roknaður fyri hvønn ásettan tíma, tó ikki út um dagpening fyri samdøgur. Náttarviðbót verður veitt fyri at hava ligið nátt burtur frá tænastustaði, um innivist ikki er ávíst av arbeiðsgevaranum. Annars verður goldið sambært galdandi reglum.

**Stk. 2.** Bæði út- og heimferð eru at rokna sum arbeiðstíð.

**Stk. 3.** Støðgur upp til 3 tímar áðrenn heimferð er roknaður við í arbeiðstíðina.

**Stk. 4.** Við luttøku í neyðflutningi innanlands verður veitt viðbót á kr. 750,-

**Stk. 5.** Í sambandi við sjúkraflutning skal sjúkrarøktarfrøðingurin verða tryggjaður. Fyri at tryggja eina tíðarhóskandi upphædd, skal hendan upphædd dagførast hvørja ferð sáttmálasamráðingar eru.

### § 35. Ferðing við sjúklingi uttanlanda

Ferðartíð verður roknað sum 2 arbeiðsdagar. Um arbeiðstíðin, t.v.s. frá sjúkrarøktarfrøðingurin møtir á arbeiðsplássinum, til sjúklingurin er innskrivaður á sjúkrahús/stað uttanlanda, fer út um 8 tímar, skulu hesir tímar gjaldast sum úrtíð. Um tað ikki verður sloppið heimaftur, t.d. vegna ringt veður, útseldar ferðaseðlar, trupulleikar við flogfari v.m. verður henda tíð roknað sum arbeiðsdagur sambært § 17 ella § 23.

Sjúkrarøktarfrøðingar, sum eftir ætlanini skuldu havt kvøld-, náttar- ella tilkallivakt, skula lønast sambært planløgdu vaktum, umframt ásetingarar í § 25 ella § 26.

**Stk. 2.** Tíma/dagpeningur verður goldin frá fráfaringartíðini av sjúkrahúsinum, til sjúkrarøktarfrøðingurin er heima aftur, tó altíð minst 2 samdøgur.

**Stk. 3.** Um sjúkrarøktarfrøðingurin ynskir hetta, kann ávísast innivist, og skal hetta gjaldast av sjúkrahúsinum áðrenn fráferð. Annars verður goldið sambært galdandi reglum.

**Stk. 4.** Hýrivognur kann nýtast frá sjúkrahúsinum/staðnum til gistingarstað, frá gistingarstað til flogvøllin og frá flogvølli til arbeiðsstað.

**Stk. 5.** Við luttøku í neyðflutningi uttanlanda verður veitt viðbót á kr. 2000,-

**Stk. 6.** Í sambandi við sjúkraflutning skal sjúkrarøktarfrøðingurin verða tryggjaður. Fyri at tryggja eina tíðarhóskandi upphædd, skal hendan upphædd dagførast hvørja ferð sáttmálasamráðingar eru.

### § 36. Hita og kulda viðgerð

Tá ið sjúklingar fáa hita ella kulda viðgerð, ið er til ampa fyri sjúkrarøktarfrøðingin, verður hvør arbeiðstími roknaður sum 1 tími og 15 minuttir.

### § 37. Arbeiði í infektiónsmedisinskari verjudrakt

Sjúkrarøktarfrøðingur, sum arbeiðir í infektiónsmedisinskari verjudrakt, verður samsýntur við 100% yvirtíð.

### § 38. Trýsttangin

Sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava tilkallivakt til trýsttangan, fáa samsýning fyri tíðarskeiðið uttanfyri vanliga arbeiðstíð sambært § 27.

### § 39. Psykiatriviðbót

Sjúkrarøktarfrøðingar, ið arbeiða á afturlatnari psykiatriskari deild, fáa psykiatriviðbót svarandi til 20% av dagtímaløn á lønartrin 4 fyri hvørja 8 tímars vakt.

**Stk. 2.** Viðbótin sambært stk. 1. kann eisini latast, tá ið ein deild av trygdarávum verður stongd í meir enn ein mánað út í eitt, við góðkenning deildarleiðarans.

### § 40. DAT viðbót

Sjúkrarøktarfrøðingur, sum er partur av DAT-toyminum á psykiatriska deplinum, fær eina mánaðarliga viðbót svarandi til 7% av grundlønini á lønartrin 4 uttan mun til setanarbrøk.

### § 41. Dialysu viðbót

Sjúkrarøktarfrøðingur, sum arbeiðir við dialysu, fær eina mánaðarliga viðbót svarandi til 7% av grundlønini á lønartrin 4 uttan mun til setanarbrøk.

### § 42. Framhaldsútbúgving

Sum framhaldsútbúgving verður at rokna ein tilrættisløgd útbúgving innan eina ávísa sergrein ella ein útbúgving, ið er góðkend av heilsustýrinum. Framhaldsútbúgvingin kann verða kravd ella mett at verða ein fyrimunur fyri starvið.

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingar, ið hava eina framhaldsútbúgving, hava rætt at koma á eftirútbúgvingarskeið fyri at halda útbúgvingina við líka. Allar útreiðslur í hesum sambandi verða goldnar av arbeiðsgevaranum.

**Stk. 3.** Arbeiðsgevarin hevur skyldu árliga at senda sjúkrarøktarfrøðingar á framhaldsútbúgvingar við fullari løn og uttan eykaútreiðslur fyri sjúkrarøktarfrøðingin.

### § 43. Kliniskir vegleiðarar

Umframt viðbót fyri framhaldsútbúgving í § 7, skulu sjúkrarøktarfrøðingar, sum hava kliniska vegleiðaraútbúgving eisini hava førleikaviðbót sambært ECTS í § 7, sjá lønartalvu.

**Stk. 2.** Harumframt fáa allir sjúkrarøktarfrøðingar, ið eru vegleiðarar eina ábyrgdarviðbót, sum er ásett soleiðis:
- 800 kr. um mánaðin meðan heilsuhjálparanæmingar eru á deildini.
- 900 kr. um mánaðin meðan heilsurøktaranæmingar eru á deildini.
- 1000 kr. um mánaðin meðan sjúkrarøktarfrøðilesandi eru á deildini.

Ein sjúkrarøktarfrøðingur fær ikki fleiri ábyrgdarviðbøtur, um hann hevur fleiri lesandi samstundis. Tó verður altíð hægsta ábyrgdarviðbótin givin.

### § 44. Tímaløn fyri undirvísing, próvdøming og fyrilestur

Sjúkrarøktarfrøðingar, ið ikki eru settir við sjúkrarøktarfrøðiskúla, hava rætt til serligt gjald fyri sjúkrarøktar undirvísing og fyrireiking av frálæru til sjúkrarøktarfrøðilesandi eftir hesum reglum.

a) Tá ið undirvísing og fyrireiking eru í vanligari arbeiðstíð: Eingin viðbót.

b) Er undirvísing uttanfyri arbeiðstíðina, fæst gjald fyri teir tímar, frálæran er.
c) Tá ið undirvísingin er í arbeiðstíðini, men fyrireikingin uttanfyri arbeiðstíðina, fæst ½ gjald fyri teir tímar, undirvíst er.

***Samsýning:***
Tímaløn fyri undirvísing er sambært ásetingunum í avtaluni um vaktargjøld, gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð v.m. Uppgávurætting: 1 uppgáva = kr.250,-. Uppgávurætting til endaliga próvtøku: 1 uppgáva = kr.600,- Uppgávurætting Heilsuskúli Føroya: 1 uppgáva = kr. 200,-

Tá ið uppgávurætting av bachelorprojektinum fer at koma fyri, er semja um, at rættisamsýningin verður roknað við útgangsstøði í tí, sum er galdandi á Fróðskaparsetrinum, t.e. 1 uppgáva = 6 tímar á kr. 413,95.

**Stk. 2.** Fyri frálæru til aðrar fakbólkar verður fyri hvønn undirvísingartíma, íroknað fyrireiking, tímalønin goldin kr. 341,02 umframt 12% í frítíðarløn.

**Stk. 3.** Fyri frálæru til sjúkrarøktarfrøðingar verður fyri hvønn undirvísingartíma, íroknað fyrireiking, tímalønin goldin kr. 418,27 umframt 12% í frítíðarløn.

**Stk. 4.** Tá sjúkrarøktarfrøðingar halda fyrilestur, verður goldið kr. 1.048,39 fyri fyrsta tíma og kr. 440,10 fyri hvønn fylgjandi tíma, íroknað fyrireiking.

**Stk. 5.** Frálæra, ið verður givin um kvøldið, t.e. aftaná kl. 17:00, verður samsýnd eftir § 48, stk. 1-3, umframt eitt ískoyti uppá 20%.

### § 45. Heilsuskúli Føroya

Lærarar settir við Heilsuskúla Føroya verða løntir sum sjúkrarøktarfrøðingar á lønartrin 1-6 umframt hægstu ECTS gevandi viðbót

### § 46. Fróðsskaparsetur Føroya

Sjúkrarøktarfrøðingar, settir í starv sum vísindastarvsfólk á Fróðsskaparsetur Føroya, fáa lønar- og setanarviðurskifti samsvarandi sáttmálan hjá AKF.

# Partur 4

**§ 47. Ferðaútreiðslur**

Ferðaútreiðslur í sambandi við avloysarastarv í Føroyum verður rindað av setanarstaðnum. Avtalan er galdandi upp til 8 mánaðir.

**§ 48. Flutningur**

Sjúkrarøktarfrøðingar hava rætt til flutningsendurgjald, um teir nýta egnan bil til arbeiðsbrúk.

**Stk. 2.** Fyri koyring í egnum bili verður veitt endurgjald sambart galdandi rundskrivi

**§ 49. Bústaður**

Undir fyribils tænastu á øðrum stovni enn tí, starvsfólkið arbeiðir á, har arbeiðsgevarin hevur álagt starvið, hevur arbeiðsgevarin skyldu at útvega ókeypis bústað, um fastar útreiðslur eru á upprunastaðnum.

**§ 50. Arbeiðshølið**

Arbeiðsgevarin hevur skyldu at útvega og gjalda skrivstovuhøli, innbúgv, skrivstovulutir, telefon o.a.

**Stk. 2.** Kommunurnar hava skyldu at útvega og gjalda skrivstovuhøli, innbúgv, skrivstovulutir, telefon o.a. til heilsufrøðingar.

**§ 51. Frítíð**

Starvsfólk í føstum starvi er lógarfest frítíð samb. løgtingslóg nr. 30 frá 01.04.86. "Frítíð við løn" við broytingum.

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingur skal hava fráboðan um summarfrítíð í seinasta lagi 1. februar.

**Stk. 3.** Frítíð verður bert hildin við heilum arbeiðsfríum

døgum. Svarar vunnin frítíð til brotpartar av einum degi, kann tíðin, eftir avtalu við starvsfólkið, leggjast saman við aðrari vunnari frítíð.

**Stk. 4.** Parttíðarsett, ið arbeiða uttan fyri ásettu arbeiðstíð, fáa 12 % í frítíðarviðbót fyri meirarbeiði.

**Stk. 5.** Starvsfólk eiga rætt til serstakt frítíðargjald svarandi til 1,5% av allari føstu árslønini, sum merkir grundløn og hækking av grundløn vegna eftirútbúgving umframt eftirlønargjald og 12% av øllum útgoldnum viðbótum og úrtíðarløn í undanfarna innvinningarári. Hesi gjøld verða at gjalda í seinasta lagi, tá frítíðin byrjar. Nevnda 1,5% frítíðargjald verður ikki goldið, tá farið verður úr starvi, men ístaðin verður frítíðargjald 12% goldið av allari lønini undanfarna innvinningarár.

**Stk. 6.** Innvinningarárið er frá 1. januar til 31. desember. Frítíðin eigur í tann mun, tað er gjørligt, tó minst 4 vikur samanhangandi, at verða hildin í tíðini 2. mai til 30. september.

**Stk. 7.** Sjúkradagar í frítíð verða vanliga roknaðir sum frítíðardagar.

Tó kunnu eftir umsókn í serligum førum, har sjúka forðar fyri nýtslu av frítíðini á rímiligan hátt, slíkir sjúkradagar koma undir reglurnar fyri sjúku, og nýggir frítíðardagar verða tá givnir.

Um starvsfólkið er óarbeiðsført, tá frítíðin byrjar, verða tó altíð latnir eyka frítíðardagar.

Frítíðin byrjar á fyrsta frítíðardegi.

## § 52. Sjúka og barn sjúkt

Fastløntir sjúkrarøktarfrøðingar hava í sambandi við sjúku rætt til løn. Sjúkrarøktarfrøðingur hevur skyldu at boða arbeiðsstaðnum frá áðrenn arbeiðsbyrjan fyrsta sjúkradag, ella skjótast tilber aftaná.

Sjúkrarøktarfrøðingur hevur skyldu at skjalprógva fráveruna, um arbeiðsgevarin áleggur tað. Sjúkrarøktarfrøðingur hevur ikki skyldu at upplýsa sjúkraorsøk. Biður arbeiðsgevarin um læknaváttan, skal arbeiðsgevarin gjalda fyri hesa.

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingar hava rætt til at fáa frí uttan lønarmiss í sambandi við, at heimabúgvandi børn eru sjúk. Hetta er galdandi fyri 1. sjúkradag hjá barninum. Skylda er at upplýsa, um tað er barn, ið er sjúkt.

**Stk. 3.** Um sjúkrarøktarfrøðingurin sjúkrameldar seg á frígongudegi, skal dagurin roknast sum frígingin. Um sjúkrarøktarfrøðingurin sjúkrameldar seg, áðrenn frígongudagurin er byrjaður, verður tíðin at rokna sum sjúkradagur.

**Stk. 4.** Sjúkrarøktarfrøðingurin hevur skyldu til at boða arbeiðsstaðnum frá, tá hann er førur fyri at taka upp arbeiðið aftur. Fráboðað skal vera í seinasta lagi 10 tímar, áðrenn tilrættislagt arbeiði byrjar.

### § 53. Barnsburðarfarloyvi og ættleiðingarfarloyvi

Sjúkrarøktarfrøðingur, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

**Stk. 2.** Sjúkrarøktarfrøðingurin hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing.

**Stk. 3.** Prógvar sjúkrarøktarfrøðingurin við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og sjúkrarøktarfrøðingurin hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

**Stk. 4.** Umframt nevndu sømdir kann sjúkrarøktarfrøðingurin fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

**Stk. 5.** Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín.

**Stk. 6.** Sjúkrarøktarfrøðingar, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

**Stk. 7.** Umframt farloyvið nevnt í stk. 2-6, hevur sjúkrarøktarfrøðingurin rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

# Partur 5

### § 54. Álitisfólk

Á einum arbeiðsplássi, har 3 limir í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar arbeiða, hava teir rætt at velja eitt álitisfólk.

Til álitisfólk kunnu bert veljast tey, ið eru virknir limir í felagnum. Treyt fyri at kunna veljast sum álitisfólk er, at viðkomandi hevur starvast minst ½ ár á avvarðandi stovni.

Valið hevur ikki gildi, fyrr enn tað er góðkent av Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og tað er fráboðað leiðsluni á avvarðandi stovni. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið. Avvarðandi stovnur hevur rætt at mótmæla valið til Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, um hetta hendir innan 14 dagar eftir, at avvarðandi stovnur hevur fingið valúrslitið.

### § 55. Álitisfólkaskeið

Tá álitisfólk søkja um at sleppa á álitisfólkaskeið og aðalfund, eigur avvarðandi stovnur at viðgera slíkar umsóknir við vælvild. Sama er galdandi fyri nevndarlimir í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

### § 56. Uppgávan hjá álitisfólkum

Álitisfólk hevur skyldu at ansa eftir, at lógir, sáttmálar, fyriskipanir, mattíðir o.a., ið er galdandi fyri arbeiðsstaðið sum heild, verða hildin.

**Stk. 2.** Álitisfólk hevur rætt og skyldu at tingast við deildar- og stovnsleiðsluna um øll mál, sum av Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar eru løgd til tess. Eru álitisfólk og starvsfólk ikki nøgd við avgerð leiðslunar eftir loknar samráðingar, skal málið leggjast fyri Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Stk. 3.** Álitisfólk skal – í samráð við stovnin – í arbeiðstíðini hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgum ella arbeiðsviðurskiftum á staðnum, tó soleiðis at tað tarnar arbeiðinum so lítið sum gjørligt.

**Stk. 4.** Tá talan er um setan av starvsfólki, skal álitisfólkið hava málið til ummælis, áðrenn endalig støða verður tikin.

**Stk. 5.** Tá talan er um flyting ella uppsøgn av starvsfólki, skal leiðslan samráðast við álitisfólkið á avvarðandi deild. Verða partarnir ikki samdir, skal álitisfólkið leggja málið fyri felagið.

### § 57. Broyting í arbeiðsgongd v.m.

Tá avgerandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, ella nýggj tøknifrøði verður tikin í nýtslu, skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi at vera við í tilrættisleggingini. Krevja tílík tiltøk eftirútbúgving, skulu starvsfólk á avvarðandi stovni hava høvi til at fáa neyðuga eftirútbúgving, so tey kunnu røkja hetta arbeiðið.

**Stk. 2.** Álitisfólk skal hava skipanarreglur fyri viðkomandi stovn.

Eisini skal álitisfólk takast við í ráðleggingina, tá broytingar verða gjørdar samb. stk. 1.

**Stk. 3.** Áðrenn nýggjar arbeiðsuppgávur ella broytingar í arbeiðs- ella ábyrgdarøki verða álagdar sjúkrarøktarfrøðingum, skulu setanar- og lønarviðurskiftini takast upp til samráðingar við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

### § 58. Nevndarlimir

Um starvsfólk er valt í nevnd felagsins, skal verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemjum. Felagið Føroyskir Sjúkraróktarfrøðingar ger avvarðandi stovn varugan við hetta í hvørjum einstøkum føri.

Um sjúkrarøktarfrøðingur er valdur í nevnd Felag Føroysku Sjúkrarøktarfrøðinga, skal sjúkrarøktarfrøðingurin hava tænastufrí við løn til nevndararbeiði ein dag um mánaðin.

### § 59. Forkvinnan

Tann, sum verður vald til forkvinnu í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, hevur altíð rætt til farloyvi frá sínum egna starvi uttan løn. Tá forkvinnutíðin er av, hevur stovnurin skyldu at hava starv tøkt á sama støði, á sama stovni og í sama øki.

### § 60. Uppsøgn av álitisfólkum og nevndarlimum

Verða álitisfólk og nevndarlimir uppsagdir í setanartíðini og tvey ár aftaná, at tey eru farin frá sínum álitisstørvum, skal uppsøgnin viðgerast millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og arbeiðsgevaran. Við uppsøgnini skal fylgja holl skrivlig grundgeving fyri uppsøgnina. Henda grundgeving verður grundarlagið undir fundinum millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og arbeiðsgevaran.

Metir Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar uppsøgnina ógrundaða, skal álitisfólkið og nevndarlimurin halda fram í starvinum og sum álitisfólk.

Uppsagnartíðin hjá álitisfólki verður longd soleiðis, at 3 mánaðir verða lagdir afturat uppsagnartíðini, sum hvørt einstakt álitisfólk hevur innvunnið. Partur 6

## § 61. Fasti Gerðarættur

Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

## § 62. Gildi sáttmálans

Sáttmálin ger galdandi frá 1. oktober 2019 til 1. januar 2023. Semjan kann uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. januar 2023. Tá sáttmálin er uppsagdur, verða samráðingar at taka upp sum skjótast og í seinasta lagi ein mánað eftir, at áheitan um samráðingar er komin.

Tórshavn, fríggjadagin 7. mai 2021

Vegna

*Súsanna Nolsøe*
**Fíggjarmálaráðið**

Vegna

*Óluva í Gong*
**Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar**

# *SERAVTALA*

millum

# Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar

og

# Kommunala Arbeiðsgevarfelagið

## § 1 Avtaluøki og avtalupartur

Sjúkrarøktarfrøðingar fylgja ásetingunum í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar. Avtalupartarnir eru tó samdir um saman at viðgerða og taka avgerð um øll viðurskifti, størv og flokkingar, ið eru serstøk fyri kommunala arbeiðsøkið.

## § 2 Flokkingar FFS og KAF

Flokkingaravtala millum Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

***Visitatorar***

1. Frá 1. oktober 2019 stig 6 umframt møguleika fyri førleikaviðbót
2. Frá 1. oktober 2021 stig 8

***Bólkaleiðarar***

1. Frá 1. oktober 2019 stig 6 umframt møguleika fyri førleikaviðbót
3. Frá 1. oktober 2021 stig 8

***Dygdarmennari/fakligur samskipari*** stig 8

***Leiðarar/stjórar og eindarleiðarar/varastjórar***

Eindarleiðari í Heilsu- og umsorganartænastuni stig 11
Eindarleiðari í Suðuroyar bú- og heimatænastu stig 10
Eindarleiðari í VEKS (økisleiðari) stig 10
Leiðari í Suðuroyar bú- og heimatænastu stig 11
Stjóri í Vesturvón stig 11

***Aðrar flokkingar***

Sjúkrarøktarfrøðingar við vanligari flokking, ábyrgdarhavandi sjúkrarøktarfrøðingar, varaleiðarar og deildarleiðarar fylgja flokkingum og lønarásetingum í galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar

### § 3 Leiðarar/stjórar settir í Bú- og Heimatænastu

Um so er, at leiðarin/stjórin fyri Bú- og Heimatænastuna ikki er sjúkrarøktarfrøðingur, verður skipað eitt sjúkrarøktarfrøðingastarv, sum skal umfata ta sjúkrarøktarfakligu ábyrgdina. Lønin verður ásett sambært samráðing millum Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í hvørjum einstøkum føri.

### § 4. Sein vitjan/uppkall

Í primeru tænastuni, har tað ikki er skipað samdøgurðsrøkt, førir hetta við sær, at vitjan millum kl 18:00 og 07:00 bert kann fara fram í serligum umstøðum og verður goldin soleiðis:

- Mánadag til fríggjadag kl. 18:00 - 23:00 yvirtíð
- Mánadag til fríggjadag kl 23:00 – 07:00 yvirtíð + 50%
- Leygardag og sunnudag kl 18:00 – 07:00 yvirtíð + 50%

Minst ein tími verður goldin. § 24, § 25 og § 26 í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar eru eisini galdandi.

### § 5 Gera lík í stand

Sjúkrarøktarfrøðingar í heimatænastuni fáa viðbót bæði fyri at gera lík í stand og fyri at leggja í kistu

- Frá kl 07:00 – 23:00 verður útgoldið 140,- kr. hvørja ferð
- Frá kl 23:00 – 07:00 verður útgoldið 250,- kr. hvørja ferð

Verður arbeiðið útint í vikuskiftinum ella á skeivum halgidøgum, eru § 25 og § 26 í sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar eisini galdandi.

## § 6 Súkrarøktarfrøðingar í heimatænastuni

Fyri sjúkrarøktarfrøðingar í heimatænastuni er galdandi: Eftir umsókn kann innan fyri hvørt 2 ára setanarskeið gevast tænastufrí við løn í 2 vikur til eitt av sáttmálapørtunum góðkent skeið. Skeiðsgjald og ferðaútreiðslur verða goldnar av arbeiðsgevaranum

## § 7 Gildisskeið

Avtalan er galdandi frá 1. oktober 2019 til 1. januar 2023. Avtalan kann sigast upp við 3 mánaðar freist til 1. januar. Fyrstu ferð til 1. januar 2023.

Tórshavn

Vegna

*Anita Fuglø*
**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

Vegna

*Óluva í Gong*
**Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar**

# *Protokollat við meira*

**Protokollat 1**

Føroya Landsstýri og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar kanna møguleikarnar at seta ymiskar framhaldsútbúgvingar á stovn í Føroyum. Hesar kanningar skulu setast í verk áðrenn 1. juni 1990.

**Protokollat 2**

Partarnir eru samdir um, at rímilig fráboðanarskylda við frítíð eigur at vera 3 mánaðir, áðrenn frítíðin byrjar.

Strembað verður ímóti at halda hesa fráboðanartíð.

Protokollat viðvíkjandi arbeiðsumstøðunum

Partarnir gera í felag eina endamálsorðing fyri hvussu kanningar, ið skulu meta um, um ov stór arbeiðsbyrða

er á ávísum arbeiðsplássum skulu gerast. Hetta verður gjørt við tí fyri eyga, at meta um almennar tænastur

og arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólki í almennum starvi.

Partarnir gera eina skipan fyri hvussu slíkar kanningar kunnu gerast.

**Viðmerkingar:** Hugt eigur at vera at í hvønn mun verandi stovnar kunnu vera við til at røkka endamáli við omanfyri nevndu kanningum, og um kanningararbeiðið er í tráð við uppgávur í verandi stovnar longu gera, ella ætla at gera.

**Sáttmálaviðurskifti**

Partarnir vilja í sáttmálaskeiðinum hyggja nærri at, um tað ber til at gera sáttmála, har miðað verður eftir:

- skipaðum og greiðari viðurskiftum
- einfaldari og liðiligari sáttmála
- nýggjari lønarskipan, ið inniber kvalifikatións- og funktiónsløn.

**Treytað protokollat um almenna lønarlagið**

Fíggjarmálaráðið fer saman við fakfeløgunum at finna fram til almennar reglur um, hvussu almenn størv skulu verða flokkað og lønt. Verður í semju funnið fram til tílíkar leiðreglur, verða sáttmálasamráðingar frá 2010 at rokna at fara fram eftir hesum leisti: Triðingurin av almennu lønarpuljuni verða settir av til at javna teir skeivleikar, sum eru í almenna lønarlagnum. Hugsað verður um at hyggja at tí Íslendska modellinum. Tá ið fakfeløg umboðandi meiri enn helvtina av almennu starvsfólkunum hava gjørt sáttmála, sum gongur út tann 1. oktober í 2010 og hava skrivað undir protokollatið, hetta áðrenn 2007 er runnið, kemur protokollatið í gildi, og farið verður til verka.

## *Avtala um fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar*

Partarnir viðurkenna rættin hjá hvørjum øðrum at lýsa og at seta í verk arbeiðssteðg eftir ásetingunum niðanfyri.

**Stk. 2.** Fráboðan um arbeiðssteðg, eisini samhuga arbeiðssteðg, skal verða skrivlig og latin mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum.

**Stk. 3.** Fráboðanin skal greitt siga frá, hvønn arbeiðssteðg talan er um, og hvussu víðfevndur arbeiðssteðgurin er.

**Stk. 4.** Arbeiðssteðgur kann ikki verða fráboðaður, meðan sáttmálin er í gildi. Er sáttmálin farin úr gildi, kann arbeiðssteðgur ikki verða fráboðaður, fyrr enn samráðingar um nýggjan sáttmála eru endaðar. Er Semingsstovnurin komin uppí, ella er Semingsstovnurin boðsendur, eru samráðingarnar at meta sum endaðar, tá ið Semingsstovnurin er givin við semingsroyndini, og hevur boðað frá tí.

**Stk. 5.** Hendan avtalan kann sigast upp saman við uppsøgnini av sáttmálanum partanna millum, við somu freist og fráboðan. Tó kann hendan avtalan bara ógildast við nýggjari avtalu.

**Stk. 6.** Henda avtalan fær gildið frá 1. juli 2014.

# *Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólka-politikk á landsins stovnum.*

**1. Inngangur**

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um, at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

- Førleikamenning
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum
- Javnstøða

Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá landinum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**

Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá landsins stovnum. Tað er tað arbeiði, sum tey í landsins tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at landsins stovnar mennast.

Partarnir eru tí samdir um, at:

- miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum almennum stovnum við høgum tænastustigi.
- hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við

eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur at seta sær miðvís menningarmál.

- endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.
- starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
- Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á landsins stovnum.

## 3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka stovninum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi. Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

***Niðursett tíð***

Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:

a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast hjá landinum seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

Starvsfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.

Stovnurin kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

***Niðursett tíð orsaka av sparingum***

Gera sparingar, at starvsfólk verður sett niður í tíð, varveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um at starvstíðin ikki var sett niður. Treytirnar eru:

a. starvsfólkið hevur fylt 55 ár
b. starvsfólkið hevur starvast hjá landinum seinastu 10 árini
c. arbeiðstíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett

***Lægri starv***

Stovnur kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá landinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.

Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.

Stovnurin kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

## 4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum

Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.

Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum

verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

Punkt 4 í hesari avtalu skal lesast soleiðis, at sjúkraróktarfrøðingur kann halda frí við løn upp í 10 dagar.

## 5. Javnstøða

Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

## 6. Umleggja alment virksemi

Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

# *Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins*

**§ 1. Inngangur**

Skulu uppgávurnar hjá stovnum landsins verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.

**Stk. 2.** Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá landinum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2. Øki**

Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.

**§ 3. Endamál**

Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikamenningin styrkist. Hetta skal nøkta tørvin á fakligari menning hjá einstaka stovninum og einstaka starvsfólkinum.

### § 4. Menningarmál

Fyri hvørt einstakt starvsfólk á øllum stovnum hjá landinum verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka stovninum.

**Stk. 2.** Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.

**Stk 3.** Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.

**Stk. 4.** Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.

### § 5. Almennur førleiki

Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaki stovnurin og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.

### § 6. Leiklutur hjá leiðslu, starvsfólki og samstarvsnevnd

Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini hjá stovninum og tørvinum á strategiskari førleikamenning

- áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á stovninum
- samráðast um grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar
- áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar

**Stk. 2.** Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á stovninum.

**Stk. 3.** Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um stovnurin hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir samstarvsnevndini.

## § 7. Fylgibólkur

Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Fíggjarmálaráðið og tey feløg, sum hava undirskrivað hesa avtalu.

# *Avtala um serstaka fríviku*

**Øki**

**§ 1.**

Avtalan er galdandi fyri mánaðarlønt starvsfólk.

**Stk. 2.** Avtalan er eisini galdandi fyri tímalønt, sum eru í starvi í meiri enn 3 mánaðir. Hvussu frívikan verður innvunnin og hildin

**§ 2.**

Aftur at frítíðini eftir frítíðarlógini, vinnur starvsfólk eina sertaka fríviku um árið. Vunnir verða 0,42 serstakar frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Serstøku frídagarnar verða vunnir samsvarandi setanarbrøkinum.

**Stk. 2.** Serstaka frívikan verður innvunnin og hildin í frítíðarárinum, á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.

**§ 3.**

Setanarmyndugleikin og tann setti avtala, nær í frítíðarárinum serstaka frívikan verður hildin. Hon verður løgd í samráð við starvsfólkið, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Starvsfólkið skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær ætlanin er at halda frívikuna.

**Stk. 2** Frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.

**§ 4.**

Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu í staðin avtala, áðrenn frítíðarárið byrjar, at serstaka frívikan ella partur av henni verður ikki hildin, men útgoldin, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.

**§ 5.**

Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu eisini avtala, at serstaka frívikan ella partur av henni, sum er ikki hildin, tá ið frítíðarárið er av, verður flutt at halda í seinri frítíðarári.

**Stk. 2.** Avtalan skal vera skrivlig og avtalað skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.

**Stk. 3.** Verður avtala ikki gjørd sambært stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7.

**§ 6.**

Fer starvsfólk úr starvi, og hevur ikki hildið serligu frívikuna ella part av henni, verður hon útgoldin, jb. §7.

**§ 7.**

Útgjaldið fyri serstakan frídag er ½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.
Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðarískoyti.
Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 8.**

Avtalan hevur gildi frá 1. oktober 2003.

**§ 9.**

Starvsfólk, sum er í starvi alt innvinningarárið 2003/2004, tvs. frá 1. apríl 2003 til 31. mars 2004, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2004. Hevur starvsfólkið verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serligu frídagarnir lækkaðir samsvarandi.

# *TEKNOLOGIAVTALA millum Føroya Landsstýri og Sjúkrasystrafelag Føroya*

**Grein 1**

Báðir partar viðganga, at treytin fyri, at nýtsla og upptøka av tøknikunnu kann vera teimum til fyrimuns, er, at starvsfólkini hava ávirkan, bæði á upptøku av tøknikunnu og nýtslu av henni.

**Grein 2**

Semjan fevnir um upptøku, nýtslu og menning av øllum tøknibúnaði og kervum - haruppií arbeiðsgongd í hesum sambandi - á stovnum/arbeiðsøkjum, ið sáttmálin millum Føroya Landsstýri og Sjúkrasystrafelag Føroya fevnir um.

**Grein 3**

Áðrenn nýggjur tøknibúnaður og nýggj kervi verða tikin í nýtslu, og áðrenn broytingar verða gjørdar í virkishátti og nýtslu av verandi kervum, skal samráðast við starvsfólkini/álitisumboðið sambært greinunum niðanfyri.

**Grein 4**

Umhugsar stovnurin broytingar í kervinum ella upptøku av nýggjum tøknibúnaði, skal starvsfólkið/álitisumboðið hava hetta at vita beinanvegin. Allar upplýsingar um hetta skulu latast skrivliga, um starvsfólkini/álitisumboðið krevja tað, og vera lættar at fata. Upplýsingar skulu í minsta lagi lýsa:

a. endamál
b. virkishátt
c. tilfeingisnýtslu
d. skap
e. samband við verandi og ætlað kervi
f. uppdráttur av broytingini skal fylgja við

Harumframt skal lýsingin geva eina meting um avleiðingar fyri:

a. arbeiðsgongd
b. starvs- og lønarviðurskifti
c. útbúgvingartørv
d. arbeiðsumstøður

Útreiðslur, sum standast av omanfyri standandi, verða goldnar av arbeiðsgevaranum.

**Grein 5**

Tá ið upptøka av nýggjum tøknibúnaði ella kevum hevur við sær, at størv verða niðurløgd, skal Landsstýrið, um møguleiki er fyri tí, flyta starvsfólkið í nýtt starv, og í hesum sambandi lata tað umskúla ella eftirútbúgva.

Arbeiðsgevarin rindar alla umskúling og eftirútbúgving.

Um hetta ikki letur seg gera, skulu Landsstýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya taka spurningin upp til samráðingar og avgerðar sínamillum.

**Grein 6**

Einki verandi sjúkrasystraarbeiði skal flytast til aðrar stovnar uttan fyri sáttmálaøkið uttan avtalu við Sjúkrasystrafelag Føroya.

**Grein 7**

Stovnurin er pliktaður til í samstarvi við starvsfólkini/álitisumboðið at syrgja fyri eftirútbúgving og umskúling av starvsfólkunum, áðrenn tøknibúnaður verður tikin í nýtslu, ella broytingar fara fram. Útreiðslur veða goldnar av arbeiðsgevaranum.

Avtalast skal millum starvsfólk/álitisumboð og leiðslu, á hvørjum støði útbúgving og umskúling skulu vera. Somuleiðis skal avtalast gongdin í hesum.

**Grein 8**

Starvsfólkini á einum stovni kunnu, um tey ynskja tað, velja eitt tøkniumboð, og eru á stovninum fleiri deildir, kunnu tey velja eitt umboð á hvørjari deild eftir somu reglum, ið álitisumboð verða vald. Tøkniumboðini eru undir somu vernd, rættindum og skyldum sum álitisumboð.

**Grein 9**

Upptøka av tøknikunnu skal ongantíð gera arbeiðsumstøður, umhvørvi og heilsustøðu starvsfólkanna verri - hvørki nú ella seinni.

Árins-, arbeiðsumhvørvis- og heilsukanningar skulu tí gerast, um starvsfólk/álitisumboð krevja tað, og um illgruni er um trygdina. Arbeiðsgevarin rindar kostnaðin til hesar kanningar.

Føroya Landsstýri og Sjúkrasystrafelag Føroya fara saman at avgera, um slíkar kanningar eru gjørdar í nóg stóran mun.

**Grein 10**

Innanhýsis avtalur kunnu gerast á einum stovni millum leiðslu og starvsfólk/álitisfólk við heimild frá Sjúkrasystrafelagi Føroya um nýtslu av tøknikunnu og arbeiðsgongd í hesum sambandi.

**Grein 11**

Trætur hava dvøljandi ávirkan og verða viðgjørdar sambært sáttmálanum millum Føroya Landsstýri og Sjúkrasystrafelag Føroya.

**Grein 12**

Semjan fær gildi frá 1. januar 1992. Semjan kann uppsigast av báðum pørtum við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til 1. juni 1993.

Um semjan er uppsøgd, hava partarnir tó skyldu at fylgja henni, til onnur semja er komin í gildi.

# *Aðrir sáttmálar*

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur fleiri aðrar sáttmálar. Hetta eru sersáttmálar so sum sáttmálin við Kommunulæknar, Krabbameinsfelagið, Kommunur, Oljufeløg v.m.